# Ullaroyting í Lítla Dímun

Fríggjadagin 21. juli vóru hvalbingar í Lítlu Dímun. Hesuferð var tað ullaroyting. Menn hava verið og eru eisini hesa tíðina úti í Dímun og fleyga lunda. Ein hugleiðing um eina náttúruperlu, ið hvalbingar eiga úti á fjørðinum har sólin rísur



*Kathrine Allan Jensen frammi í skuti á "Biritu". Oyggjabáturin, ið flytir fólkið inn á Helluna, sæst frammanfyri "Biritu"*



*Absalon Eysturoy og danska unnusta hansara í brattlendi. Fest í bergið er ketan at styðja seg til. Hjá báðum er tað fyrsta ferðin í Dímun. Tað er gjøgnum Rasmus hjá Annu hjá Signevu, at tey koma við til Dímunar. Bæði roynast einastandandi væl henda fagra summardag.*



*Rættin í Lítla Dímun*

??????????

*Maud Julianna Næs*

Hóskvøldið hoyrdist, at um veðurlíkindi vóru var farið til Dímunar. Kl. 5 morgunum eftir var útpurring, jú veðurlíkindi vóru. Kl. 6 vóru allir menn møttir og farið var við tveimum útróðrarbátum "Biritu", hjá Signari Olsen og "Bodil ", hjá Pálli Poulsen og afturúr var oyggjabáturin sleipaður. Eitt náttúruundur lýsir upp fyri okkum umborð, meðan Vatndalsfossur dundrar í dýpið. Umleið 15 fólk eru á hvørjum báti. 3 konufólk eru við í dag. Ikki er vanligt at fleiri konurfólk eru við. Lítla Dímun er "mannfólkadomæne"... ein avbjóðing har dreingir gerast til menn, tá teir eru um fermingaraldur, eitt yvirgangsritualið, ein manndómsroynd.

Ov fáair av teimum royndastu monnunum, ið vanliga taka tung tøk, ið eru teir djarvastu oyggjarmenn, eru við í dag, og tað kemur eisini at vísa seg seinnri, sum dagurin líður. Fótbólstliðið Royn er á venjingarlegu í Íslandi, onkrir eru úti við trolara og aðrir landa norðanfjørs av teimum, ið vanliga reka í Dímun, og tað merkist seinnri á rættini.

## Upp á oynna

Tá út er komið til Lítla Dímun, fara menn í oyggjabátin, sum tveir av teimum eldru nú rógva inn í Holið í Torvkletti. Ein frægur loypur fyrstur á land, síðani verður band lora út á bátin, soleiðis at lættari er at loypa aftaná. Jú, kyrt er í morgun. Og so gongur leiðin upp. Gingið verður eftir Hellini upp í Álkufløttar. Fyrst koma vit upp á Gráða Klett, so upp ígjøgnum stigan upp Múlagøtu upp undir Hamaran á Múlanum, har øll setast at renna møðina og fáa sær ábit.

Bratt er allastaðir í Lítla